# Nógv ringja til rúslinjuna

**Bláikrossur:** Hvørt týskvøld og hóskvøld bjóðar Blái Krossur nú fólki at ringja til ta serstøku rúslinjuna hjá felagsskapinum. Henda skipanin byrjaði fyri einum mánaði síðani, og longu nú hava hópurin av fólki ringt til nr. 318586 fyri at fáa hjálp.

Felagsskapurin arbeiddi fyri nøkrum árum síðani við hesi ætlanini, men nú er hon so vorðin veruleiki. Hesi bæði kvøldini fara ráðgevarar at sita við telefonina og hjálpa teimum, ið ringja.

Endamálið er at veita eina tænastu til øll tey, ið á einhvønn hátt líða undir rúsdrekka ella rúsevnum, og sum ikki vita hvat tey skulu gera.

Uppgávan hjá ráðgevarunum verður fyrst og fremst at lurta, men eisini vilja tey eftir førimuni royna at koma við góðum ráðum, eitt nú til víðari hjálp, sigur Jaspur Langgaard, aðalskrivari í Bláa Krossi.

Dentur verður lagdur á, at talan er ikki um nakra viðgerð, men meiri um eitt slag av fyrstuhjálp hjá fólki, sum eru í neyð.

16 skikkaðir ráðgevarar fara upp á skift at svara rúslinjuni. Alt arbeiðið verður gjørt við tagnarskyldu.

**sb.**

# Argjamaður á gallarínum

**Tvøroyri:** Sunnudagin letur argjamaðurin Finleif Mortensen upp eina framsýning í Gallarí Oyggin á Tvøroyri.

Á framsýningini hevur Finnleif fleiri oljumálningar.

Framsýningin er opin fram til 4. januar næsta ár, allar dagar frá kl. 15 til 18.

**sb.**

# Ynskja næmingaheim á Kambsdali



*Nærhendis Studentaskúlanum á Kambsdali er nú givið eitt prinsipielt loyvi til bygging av einum næmingaheimi*

**Fuglafjørður:** Gongst sum ætlað, so fer í framtíðini at liggja eitt næmingaheim á Kambsdali.

Í farnu viku fekk nevniliga Fuglafjarðar kommuna eina umsókn frá "Næmingaheiminum á Kambsdali", har søkt verður um byggiloyvi til eitt slíkt heim á økinum.

Sambært hesi ætlan so skal heimið byggjast innanfyri Studentaskúlan, niðan móti vegnum til sethúsaøkið. Í byggisamtyktini fyri økið verður sagt, at tað er útlagt sum miðstaðarøki, men higartil hevur eingin áhugi verið fyri at bygt her.

Tekniska nevnd hjá býráðnum hevur viðmælt býráðnum at geva eitt prinsipielt byggiloyvi til hetta næmingaheimið, samstundis sum býráðið fer neyðugar broytingar í byggisamtyktini.

Á fundi í býráðnum týskvøldið varð tilmælið frá teknisku nevndini einmælt samtykt.

**sb.**

